# HB skal verja oddasessin

*Tað tykist ikki, sum um nakar av pørtunum leggur nakað í hagtølini fyri slagið um Havnina*

JÁKUP MØRK

Umframt at vera slagið um Havnina, stendur eisini annað enn æran upp á spæl, tá HB í morgin er vertur fyri B36.

**Kunnu avgera sjálvir**

Eftir endaligu boðini frá FSF, sum síggjast aðrastaðni í blaðnum, er greitt, at HB í løtuni er á odda í landskappingini, og oddasessin hava teir so ongar ætlanir um missa.

- Vit hugsa fyrst og fremst um at vinna okkara dyst, og eftir at hava fingið boðini um oddasessin, kunnu vit nú sjálvir gera av, um vit skulu verða Føroyameistarar, heldur liðskiparin á HB liðnum, Rúni Nolsøe.

Í seinasta umfarinum av landskappingini skal HB til Sumbiar, so á pappírinum er ikki líkt til, at HB hevur torførastu skránna. Í øllum førum um mett verður eftir hagtølunum, tí í innanhýsis dystunum við grannarnar, hevur HB aloftast ligið omaná.

- Jú, tað er rætt, at hagtølinin eru góð fyri okkara viðkomandi, men hetta kunnu vit ikki brúka til nakað sum helst, sigur Rúni. Hann leggur afturat, at hann ivast ikki í, at teir svørt/hvítu fara at leggja nógv í dystin, so nøkur løtt uppgáva verður talan ikki um.

**Tríggir vænta**

Tríggir av teimum vanligu leikarunum, verða ikki við í Gundadali í morgin, og felags fyri hesar er, at teir meira ella minni fast hava hildið til í vinstra borði.

Janus Joensen, sum hevur átt vinstra bakkin alt árið, hevur fingið ov nógv gul kort. Harafturat hava menninir, sum vanliga røkja sessin framman fyri Janus, Rói Ártin og Pætur Dahl, báðir drigist við skaðar, og tað verður ikki roknað við teimum báðum til dystin.

Sostatt verður Ion Geolgau nærum noyddur at finna sær eina nýggja vinstru síðu. Trupulleikin er tó til at loysa, og roknast kann við, at onkrir av ungu leikarunum á næstbesta liðnum umframt Florin Mihaéscu verða við í hópinum sunnudagin.

**Minnast '91**

Í B36 hava teir at kalla slept øllum vónum um heiðursmerki í ár, men hetta merkir avgjørt ikki, at teir ætla at taka sær av løttum í morgin.

Fyri viku síðani fekk B36 rættuliga glið á, tá teir hølvaðu NSÍ av, so sjálvsálitið hjá leikarunum tykist nú á veg upp aftur, eftir leingi at hava verið í aldudalinum.



*Alt bendir á, at talan verður um eina spennandi grannauppgerð sunnudagin, tí hvørgin parturin tykist hava nakran sum helst áhuga í at vera við undirlutan*

Jens Kristian Hansen, sum er liðskipari hjá B36, sigur, at fyri teirra viðkomandi er bert eitt at gera, og tað er at stríðast fyri teimum trimum stigunum, sum spæld verða um.

Bjarni Prior, sum loksins er komin seg eftir skaða, fekk triðja gula kortið móti NSÍ, men í hansara stað kemur Mikkjal Thomassen, sum var leikbannaður tá. Jens Kristian roknar við, at allir mans annars eru

Í B36 munnu teir heldur ikki hava gloymt seinasta umfarið av landskappingini í 1991. Tað ferðini kundi B36 gerast meistarar, um teir vunnu á HB, sum einki hevði at spæla fyri. Endaliga úrslitið gjørdist tó 1-1, og FM steypið fór tí til Klaksvíkar.

Við øvugum forteknum líkist støðan í dag nógv teirri frá 1991, so alt talar fyri eini sera spennandi grannauppgerð, tá annar partur av slagnum um havnina skal standa..

# Javnleikur kann ikki brúkast

*Hjá VB stendur FM upp á spæl, og hjá B68 snýr tað seg eisini um møguleikan at sleppa í Europa Cup*



VB varð stovnað grundlógardag í 1905. 95 ára felagið hevur ongantíð vunnið meistaraskap og heiðursmerkir, síðani tað í 1942 varð farið undir FM kappingina. Nú eru tvey umfør eftir av 2000 kappingini, og tað er greitt, at VB fer at fáa heiðursmerkir. Spurningurin er hvørjum slagi, tey fara at vera av.

Um VB ikki tapir í morgin, tá teir fáa vitjan av B68, so er greitt, at heiðursmerkini í hvussu so er verða av silvuri. Men VB miðjar eftir gullinum, og í tí strembanini telur einki annað enn ein sigur á B68. Um ein sigur í morgin og ein sigur annan sunnudag í Gundadali ímóti B36 fara at bera gullkrónurnar, steypið og milliónina við sær, er treytað av, hvussu B36 fer at standa seg í grannauppgerðini í Gundadali í morgin, og hvussu Sumba fer at standa seg, tá teir annan sunnudag fáa vitjan av HB.

Hjá VB eru tveir spælarar leikbannaðir. Annar er miðvallarin Milan Kulic, sum varð útvístur í Gøtu, og hin er Magni Jacobsen, sum í Gøtu fekk triðja gula kortið. Annar av avloysarunum verður Predrag Zivkovic, sum var leikbannaður, tá VB var í Gøtu.

**Stórt trýst**

Hjá B68 stendur – um tað ber til – uppaftur meiri upp á spæl, enn tað ger hjá VB. Um B68 ikki vinnur í morgin, so er FM møguleikin burtur, og so er eisini mest sum greitt, at teir heldur ikki sleppa upp í part í Europa Cup. VB vann 2–1 á Svangaskarði. Um VB ikki tapir í morgin verða teir betri í innanhýsis uppgerðini við toftamenn, og VB hevur betri málmun enn B68.

Hjá B68 er Fróði Benjaminsen leikbannaður. Jan Petersen noyddist av vøllinum í 1. hálvleiki ímóti HB. Eitt liðband í fótinum var toygnað. Jan hevur ikki vant í vikuni, men á Toftum høvdu teir í gjár ikki mist mótið um, at vongverjin og verjukendi miðvallarin verður tøkur í morgin.

B68 ferðaliðið fer suður til Suðuroyar seinnapartin í dag. Av Toftum frættu vit í gjár, at ikki so fáir áskoðarar ætlaða sær til Vágs í morgin.

Í fjør vunnu toftamenn 2–0 í Vági, og í fyrraárið sendi VB B68 norður um aftur við 3–1 tapi.

JH





# Tað stendur um lív hjá Sumba

*Runavíkingar ætla at reisa seg aftur, eftir stórtapið fyri viku síðani*

*Sumbingar halda enn fast um lívsvónina í fyrstu deild*

JÁKUP MØRK

Sum skrivað omanfyri, so stendur tað nú at kalla um lív hjá sumbingum.

Í løtuni eiga teir niðasta sessin á stigatalvuni, og tað er fyri at sleppa av hesum, at teir í morgin leggja leiðina inn í Eysturoynna.

**Leypa á**

Nýggi venjarin hjá sumbingum, Magni eystan Á, ásannar, at tað liggur ein torfør uppgáva fyri framman, men ræddur tykist hann á ongan hátt vera.

- Vit hava verið eitt sindur í iva um, hvussu reglurnar eru við javnstøðu í stigum, men nú er so líkt til, at ein javnleikur kann verða nóg mikið hjá okkum. Tað merkir tó ikki, at vit ikki royna eftir sigrinum í Runavík, og vit fara so avgjørt ikki at grava okkum niður í royndunum at verja eina stigið, sigur Magni.

Talan er ikki um leikbann ella skaðar hjá sumbingum, og so verður spurningurin, hvussu Magni fer at blandað kortini.

At leikarar hansara eisini vita, hvat skal til, er eingin ivi um. Sumba hevur nú trý ár á rað verið mett sum fremsta niðurflytingarevni, men higartil hava teir snýtt serfrøðingarar tvær ferðir á rað, og so er spurningurin, hvørt hetta eisini fer at eydnast í ár.

**NSÍ vil reinsast**

Í Runavíkini ger NSÍ venjarin, Trygvi Mortensen, seg og leikararnar til undan seinata heimadystinum í ár.

Umframt at vera seinasti heimadysturin á árinum, líkist hetta eisini seinasta heimadystinum yvirhøvur hjá Trygva sum venjara. Hann hevur nevnliga boðað frá, at hann vegna arbeiði ikki hevur stundir at standa við stýrisvølin komandi ár.

Hópurin, sum Trygvi hevur at takað av, er meinlíkur hópinu, sum var fyri stórtapi í Gundadali, men hetta tykist tó á ongan hátt at nerva Trýgva.

- Vit vóru so fittir í Gundadali, so leikbann er sjálvandi ikki talan um, tekur hann skemtandi til. Víðari sigur hann, at tað sjálvandi fyrst og fremst ræður um at vaska talvuna reina afutr.

- Eg ivist ikki í, at spælararnir eisini eru somikið ærukærir, at teir eisini eru av somu fatan, sigur venjarin.

Sostatt tykist tað ikki at gerast nøkur løtt uppgáva hjá sumbingum sunnudagin, hóast runavíkingar sum so einki hava at spæla fyri.

# Spæla um keisarans skegg

*Mánadagin fer Rógvi Jacobsen hjá KÍ til Noregs, har hann skal royndarvenja við Sogndal*



*Enn eru sadnoyingar ikki 100% vísir í at sleppa undan niðurflyting*

Í morgin verður síðsti landskappingardysturin í hesum kappingarárinum spældur í Klaksvík. Tað er so langt síðani, at teir í KÍ staðfestu, at møguleikin var burtur fyri endurtøku av sama róminum kring vøllin, sum var, tá kappingarárið í fjør endaði.

Í fjør oysregnaði, tá síðsti dysturin varð spældur í Klaksvík. Tá stóð vøllurin undir í vatni. Einki er gjørt við vøllin enn, men higartil í ár hevur tað spælt sera væl av. Tað hevur so at siga ikki regnað teir sunnudagarnar, tá KÍ hevur havt heimadyst í landskappingini.

Tá sandoyingar í morgin koma til Klaksvíkar, hevur heimaliðið ikki annað enn æruna at spæla fyri. Klaksvíkingar eru dotnir niður á sætta plássið. Við sigri á B71 og FS Vágum er møguleiki fyri, at teir kunnu vinna seg fram á 4. plássið. Men teir hava ikki møguleika at vinna pláss í Europa Cup ella Intertoto Cup.

Hjá KÍ eru allir spælararnir tøkir, sum hava verið við tær seinastu vikurnar. Niclas Niclassen var leikbannaður, tá KÍ var í Sumba.

Sambært Norðlýsinum í gjár verður dysturin í morgin tann síðsti í hesum kappingarárinum hjá Rógva Jacobsen. Hann fer í morgin til Noregs, har hann skal royndarvenja í Sogndal í tíggju dagar. Tað vil siga, at Rógvi verður ikki við, tá KÍ komandi leygardag rundar kappingarárið av í Sørvági. Tað er ikki greitt, um teir tríggir útlendsku KÍ spælararnir aftur komandi ár fara at spæla í Klaksvík. Men vit skilja á lagnum, at tað er væl hugsandi, at dysturin í morgin verður tann síðsti í Klaksvík hjá onkrum teirra.

**Ikki heilt leysir**

Sandoyingar hava allar menn tøkar í morgin. Eingin er leikbannaður. Einasti skaðin er vøddaskaðin, sum longu í 1. hálvleiki noyddi Michael Jørgensen at taka seg burturúr í Sørvági. Í gjár roknaðu teir í B71 við, at danin verður tøkur í morgin.

Tað er framvegis møguleiki fyri, at B71 skal flyta niður. Støðan kemur í, um sandoyingar einki stig fáa í tveimum teimum seinastu umførunum, og um FS Vágar og Sumba fáa fleiri stig. Við gongdini higartil í ár í huga, má metast, at tað skal vilja illa til hjá B71, um tað endar við, at teir flyta niður.

Í fjør vann KÍ 3–1 á B71 í Klaksvík, í 1997 var úrslitið 5–2 og í 1996 4–0. B71 var í 2. deild í 1998. Í 1995 vann B71 3–1 í Klaksvík.

JH



*Hvørki Ari Thomassen ella Magni Jarnskor vera á vøllinum, tá GÍ og FS Vágar dystast í morgin. Báðir eru leikbannaðir*

# FS Vágar fingið luft

*Vágamenn lyftu seg upp um Sumba fyri viku síðani, og nú er B71 næsta mál teirra*

Jákup Mørk

Einki er at siga til, at tað var ein lætti hjá vágamonnum, tá teir fyri viku síðani vunnu altavgerandi dystin móti B71.

Sigurin og tey trý stigini viðførdu, at teir nú aftur sluppu sær upp um Sumba á stigatalvuni, og sálarliga var hetta av sonnum eitt lyft uppeftir.

**Vandin lúrir**

Støðan á stigatalvuni er tó ikki tryggari enn so, at bert eitt stig skilur partarnar, og ta Sumba samstundis er betri fyri í innanhýsis dystum, ræður um hjá vágamonnum at fáa stig við sær úr Gøtu, og tey skulu helst vera trý í tali.

Tað verður tó eitt skert FS Vágar, sum fer í Sarpisgerði í morgin, tí í øllum førum eitt, og møguliga tvey leikbann tyngja liðið.

At vit skriva møguliga tvey kemst av, at vágamenn ikki vilja vera við, at John Johannesen skal hava leikbann, hóast hann nú er skrásettur fyri 5 gul kort. Hetta tí kortið, sum hann varð skrásettur fyri móti B71, ikki varð givið honum.

Hinvegin mugu teir undir øllum umstøðum vera Ari Thomassen fyri uttan, og hetta er so ein dyggur smeitur, tí talan her er um mest roynda leikara teirra. Tórlngar Akselsen hevur vant nakað seinastu tíðina, eftir at hava veirð skaddur í fleiri vikur, og møguliga verður hann á vágaliðnum hesaferð.

**Uttan Magna**

Johan Nielsen hevur, við einum undantaki, allar sínar mans tøkar undan dystinum móti FS Vágum. Undantakið er liðskiparin, Magni Jarnskor, sum fekk reytt kort seinast.

Størsta uppgávan hjá venjaranum verður helst at motivera leikarar sínar, tí sum árið hevur gingist, hava teir einki annað enn æruna at spæla fyri í landskappingini.

Æran hevur hinvegin aloftast nógv at siga í Gøtu, og hóast árið varð bjargað við steypasigrinum, so er einki at ivast í, at gøtumenn fegnir vilja sleppa sær enn longri upp á stigatalvuna.